Álit

í

løgtingsmáli nr. 68/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing (Striking av friðingarheimildum o.a.)

Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum, Ingilín Didriksen Strøm, hevur lagt málið fram tann 7. mars 2023, og eftir 1. viðgerð tann 24. mars er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 28. mars, 11., 14., 18. og 21. apríl 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Føroya Náttúru- og umhvørvisfelag, Bóndafelag Føroya, Føroya Óðalsfelag og Ingilín Didriksen Strøm, landsstýrismann í umvhørvismálum saman við Umhvørvisstovuni.

Uppskotið er eitt fylgilógaruppskot til løgtingsmál nr. 67/2022 um náttúruverndarlóg.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hervør Pálsdóttir, Henrik Old, Kritianna Winther Poulsen, Kim Durhuus og Helgi Abrahamsen) tekur við somu grundgevingum sum í álitinum til løgtingsmál nr. 67/2022 undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Steffan Klein Poulsen) tekur við somu grundgevingum sum í álitinum til løgtingsmál nr. 67/2022 ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 9. mai 2023

Hervør Pálsdóttir formaður	Helgi Abrahamsen næstformaður	Henrik Old
Steffan Klein Poulsen	Kristianna W. Poulsen	Kim Durhuus

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur